

Steingrim Kristoffersen:

# Gjørdist húsmaður 12 ára gamal

**Í seinna parti av frásøgnini hjá Steingrim greiðir hann frá lívinum eftir, at pápin var gingin burtur við Neptun. Hann kom sjálvur 12 ára gamal at taka ábyrgdina sum húsmaður fyri síni sjey yngri systkin**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**5. partur**

Tað vóru 3. mai 75 ár síðani, at Neptun og Nólsoy eftir øllum at døma gingu burtur. Tað var merkiliga lítið skrivað í bløðunum tá um hesa sera stóra vanlukku.

Tað verður heldur ikki skrivað nógv um, hvussu hetta ávirkaði lívið í landinum. Men Tingakrossur skrivar 13. juni 1934:

*"Tað átti at verið so, at fyri øllum teinkjandi fólki í Føroyum, skuldi hetta verið ein landasorg so stór, at dansur og tílíkt ikki sømdi seg, í hvussu er ikki fyrr enn ein tíð var umliðin, frá tí allir hesir fiskararnir, ið fara heimanífrá glaðir og fúsir fyri at vinna útkomuna til tey, ið heima sita, so brátt verða burturryktir. Eftir sita konur og børn og gentur við stórari sorg – tað eru sár, ið neyvan grøðast aftur. Fyrr var so, at allur dansur steðgaði, men tíverri er tað ikki soleiðis nú."*

## Steingrim: Minni um pápan

Eg minnist pápa sum ein, ið var væl tilpassar og nokkso fryntligur. Hann var stórur og væl bygdur.

Tingakrossur skrivar annars um pápa, at hann var víða kendur fyri sín dugnaskap, og at hann annars víða um varð saknaður av øllum, sum fingu loyvi til at koma saman við honum. Hann var prúður, friðaligur og í allar mátar ein álitismaður.

Hann var sjálvur reiðari og gjørdi avrokningar og tílíkt sum hoyrdi til. Skrivstovu hevði hann í kjallaranum, og hon er har enn. Her er millum annað tann gamli pengakassin hjá honum. Her er eisini ein gomul lanterna av Neptun.

Eg minnist eisini, at pápi, sum skiparar vóru vanir, gekk bygd úr bygd at biðja fólk. Um hann eisini var í Mykinesi minnist eg ikki. Men mykinesmenn vóru altíð við, tað ið eg kann minnast. Hann hevur kanska longu, tá ið teir komu heim um heystið, biðið teir at koma við árið eftir.

Nógvir av monnum, sum fórust við Neptun, høvdu verið við árini frammanundan. Teiri vóru eisini væl mannaðir hetta árið við 23 monnum. Kanska bendir hetta á, at pápi hevur verið dámdur at vera saman við. Hann fiskaði eisini hampiliga væl.

Tummas, beiggi hansara, var annars mettur at vera sera góður fiskimaður. Tummas var pápi Henry, sum aftur er pápi tann Tummas Christoffersen, sum vit kenna í dag, og sum eisini er ein rokari.

## Gjørdist húsmaður 12 ára gamal

Hjá teimum einstøku húsunum var tað nú ein spurningur um at koma víðari. Umframt tað fíggjarliga var tað jú eisini alt, sum skuldi gerast í einum húsi.

Sum 12 ára gamal gjørdist eg tískil húsmaður við teirri ábyrgd, sum pápi annars vildi havt. Tað var nokk at gera. Eitt var fjallgonga. Markið fyri at verða roknaður fyri mann var 14 ár. Men so søgdu teir: "Latið bara báðar koma." Tað var eg og Kristoffur. Menn vóru lagaligir, tá ið tað var møguligt.

Eisini skuldu eplinu veltast, hoyggið skuldi inn, torvið skuldi skerast og arbeiðast. Tað skuldi eisini sópast hvønn dag, sum neytini vóru inni. So eg kann ikki minnast meg at hava spælt sum aðrir dreingir.

Eg fekk so ungur eini hús at hava ábyrgdina av, og tað havi eg enn í dag 75 ár seinni. Men eg havi eisini klárað meg millum nógvar rættar menn.



*Hetta er lanterna hjá Neptun, sum stóð eftir, tá ið teir fóru seinasta túrin. Her síggja vit* ***f.v.*** *Óla Jákup, Steingrin og Trygva Kristoffersen. Óla Jákup er uppkallaður eftir abbanum. Hann er sonur Kristoffur*

Tann næsti beiggin, Kristoffur, fór jú til Havnar og kom at vera so nógv burtur. Genturnar máttu sjálvsagt eisini taka síni tørn.

Mamma hevði arbeiðskonu, sum vanligt var tá. Tað hevði hon eisini eini 4-5 ár eftir, at pápi var deyður. Men hetta gjørdist ov dýrt, 20 krónur um mánaðin! Tað var tað frægasta, summar fingu 15 krónur. Børnini vuksu eisini til, so tað gjørdist ikki tann stóri tørvur longur fyri arbeiðskonu. Arbeiðskonurnar búðu inni og vóru sum ein partur av húskinum.

Sum tað er nógv broytt við arbeiði hjá teimum ungu. Tá ið genturnar vóru konfirmeraðar, fóru tær út at tæna. Har lærdu tær at passa eini hús. Tað var ikki tann ringasti lærdómurin. Tær lærdu nógv í teimum ymisku húsunum, tí tað vóru ordilig fólk, tær vóru hjá. Tá ið tær so giftust, dugdu tær at halda hús og eisini at læra frá sær.

## Mammurnar vóru hetjur

Alt gott um menninar, men eg havi altíð hildið, at tær veruligu hetjurnar, sum hava livað her á landi, eru mammurnar. Mamma var 43 ár, tá ið hon gjørdist einkja. Hon hevði eina so sera góða heilsu. Eg sá hana ongantíð vera sjúka. Hon hevði ongantíð ilt í høvdinum og beinini vóru góð. Hon gjørdist eisini 92 ár. Eg má beundra hesar konurnar.

Pápi helt Politiken og eitt annað danskt blað. Politiken segði mamma frá okkum. Telefon høvdu vit eisini. Hana segði hon eisini upp fyri at spara tær krónurnar.

Tá ið børnini vóru farin í song, fór hon at spinna á lítlastrá. Hon